# Jákup Sverri formaður í Ferðavinnufelagnum

**Nývalda nevndin í Ferðavinnufelagnum hevur skipað seg við Jákup Sverra Kass sum formanni. Hini í nevndini eru Henny á Líknargøtu, Fríðun Jacobsen, Jóhanna Rasmussen og Finn Johannesen.**

FERÐAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nýggja nevndin í Ferðavinnufelagnum, ið varð vald á aðalfundinum 30. oktober, hevði sína fyrsta nevndarfund hósdagin í farnu viku, har m. a. skipan av nevnd var á skránni, skrivar Vinnuhúsið í morgun.

Á fundinum varð eisini tosað um, hvat felagið skal leggja dent á komandi tíðina.

Áskoðanin hjá Ferðavinnufelagnum er, at føroysk ferðavinna er á einum vegamóti, og at neyðugt er at taka avgerðir um, hvussu ferðavinnan kann gerast ein meira týðandi partur av føroyska búskapinum. Ferðavinna hevur leingi verið ein av skjótast vaksandi vinnunum í heiminum, og ferðavinna er við tíðini eisini vorðin ein av heimsins størstu vinnugreinum. Saman við almennu Føroyum ynskir Ferðavinnufelagið tí at tryggja, at eisini føroyski búskapurin fær eitt munagott ískoyti grundað á ferðavinnuna.

Ein fyritreyt fyri at røkka hesum máli er miðvís marknaðarføring. Ferðavinnufelagið ynskir tí at arbeiða tætt saman við ferðavinnudeildini í Uttanríkisráðnum og saman við hesari at skipa eina miðvísa marknaðarføringsætlan, ið ger Føroyar meira sjónligar í útheiminum. Hetta arbeiði er í gongd í løtuni, og væntandi verður ein ætlan fyri marknaðarføring í útheiminum tøk síðst í hesum árinum.



Ferðavinnufelagið ætlar eisini at samstarva við ferðavinnudeildina í Uttanríkisráðnum, um at skipa fyri einum ferðavinnudegi, sum skal samantvinna vinnuligar og almennar aktørar í føroyskari ferðavinnu. Væntandi verður skipað fyri einum tílíkum degi tíðliga næsta ár.

Tað er eisini eitt ynski hjá Ferðavinnufelagnum, at arbeitt verður fram ímóti at samantvinna allar føroyskar ferðavinnuportalar, til tess at hava ein platform at marknaðarføra Føroyar á alnetinum við.

Ferðavinnufelagið ætlar eisini at leggja dent á at tryggja, at Føroyar hava haldgóð hagtøl, sum m.a. vísa, hvat ferðavinnan gevur av sær og hvørji ferðafólkini eru, sum velja at vitja og ferðast í Føroyum.




**VOLVO S40 2.4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NB 490 **Km:** 57.000
**Árgangur:** sept. 2004
**Útgjald:** 46.250 **Mðr. gjald:** 4.455 (3 ár)
**kr. 185.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FV 472 **Km:** 18.000
**Árgangur:** feb. 2008
**Útgjald:** 48.000 **Mðr. gjald:** 2.988 (5 ár)
**kr. 192.000,-**



**PEUGEOT 307 1.6 STC,** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FP 505 **Km:** 44.000
**Árgangur:** okt. 2006
**Útgjald:** 36.250 **Mðr. gjald:** 2.289 (5 ár)
**kr. 145.000,-**



**HYUNDAI SONATA 2.4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MD 028 **Km:** 64.000
**Árgangur:** apríl 2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.008 (4 ár)
**kr. 158.000,-**



**MAZDA PREMACY 1.8** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RG 751 **Km:** 95.000
**Árgangur:** sept. 2004
**Útgjald:** 24.500 **Mðr. gjald:** 2.434 (3 ár)
**kr. 98.000,-**



**BMW 320D DIESEL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KU 300 **Km:** 150.000
**Árgangur:** juni 2002
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 3.306 (3 ár)
**kr. 136.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**YARIS 1.4 D4D LUNA DIESEL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KT 175 **Km:** 101.000
**Árgangur:** mars 2006
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.066 (5 ár)
**kr. 132 .000,-**



**PEUGEOT 206 2.0 DIESEL VØRUV.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JU 505 **Km:** 53.000
**Árgangur:** jan. 2004
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.179 (3 ár)
**kr. 88.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 SOL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SP 563 **Km:** 28.000
**Árgangur:** des. 2007
**Útgjald:** 49.500 **Mðr. gjald:** 3.071 (5 ár)
**kr. 198.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo